Dráttur skal hanga í oddinum

Leygardagin verður ein dystur á skránni í meistaradeildini hjá kvinnum. Tá tekur Dráttur ímóti KÍF. Undan dystinum liggur Dráttur á triðja plássi, meðan KÍF er at finna á fimta plássi. Dysturin er serliga týdningarmikil fyri Drátt, sum skal roynaat hanga í hinum báðum oddaliðnum. Hjá KÍF sær longu rættiliga svart út at røkka heiðursmerkjunum, og tí er Dráttur favorittur undan dystinum. Hesin dysturin er samstundis ein aðalroynd til steypafinaluna hjá kvinnum, har júst hesi bæði liðini bresta saman tann 17. februar.

VB er stórfavorittur

Ein dystur í Sunset deildini hjá kvinnum verður á skránni á Skála sunnudagin, tá StÍF tekur ímóti VB. Undan dystinum liggur VB á triðja plassi, meðan StÍF liggur á fimta plássi, men stigamunurin er tó stórur. Um VB ætlar sær at halda fast í hinum báðum oddaliðunum, so er kravið ein sigur í dystinum ímóti StÍF. Vágskvinnur hava víst gott spæl síðstu dystirnar, og tí mugu teir eisini metast at vera stórfavorittar til dystin ímóti StÍF. StÍF hevur tó fyrr í ár víst, at tær kunnu basa VB, tí í fyrsta dystinum millum liðini bæði í Vági vann StÍF nevniliga stórsigur.

Kyndil-Neistin:

Neistin skal finna stevið

Neistin skal royna at koma yvir stórtapið í steypakappingini, tá tær leika lokalbrak ímóti Kyndli í Sunset kappingini

HONDBÓLTUR
Teitur Joensen
teitur@sosialurin.fo

Sunnudagin verður brakið um Havnini í bestu kvinnudeildini í hondbólti, tá Kyndil og Neistin bresta saman. Hesi bæði liðini hava ligið í hvør sínum enda av stigatalvuni í alt ár, men munurin í dystunum hevur ikki altíð verið so stórur.

Í fyrsta dystinum millum liðini í grundspælinum megnaði Kyndil at fylgja Neistanum allan vegin, og dysturin endaði eisini við javnleiki. Í seinna dystinum kom munurin á toppi og botni tó veruliga til sjóndar. Her lótu neistakvinnurnar ongantíð nakran iva vera um, hvat av liðunum var topplið, og hvat var botnlið, tí Neistin snøgt sagt smurdi Kyndil av.

Nú møtast tær so aftur. Tær grøna ímóti teimum bláu í slagnum um Havnina. Higartil hava tær bláu neistakvinnurnar verið heldur oman á, men nú fáa kyndilskvinnurnar enn ein møguleika at basa liðnum, sum liggur á 2. plássi í bestu kvinnudeildini.

TB-ÍF:

Vinnarin leggur seg á odda

Toppdystur verður í meistaradeildini hjá kvinnum í Trongisvági leygardagin, tá TB tekur ímóti ÍF. Vinnarin av dystinum leggur seg á odda í bestu kvinnudeildini

FLOGBÓLTUR
Teitur Joensen
teitur@sosialurin.fo

Vinnarin av dystinum leggur seg við vissu á odda í meiistaradeildini hjá kvinnum, tá toppdystur verður í Trongisvági millum TB og ÍF

Lagt verður upp til eitt brak av einum flogbóltsdysti, tá bestu kvinnuliðini hjá TB og ÍF bresta saman í Trongisvági leygardagin. Hetta er triðji dysturin í endaspælinum, men hetta er samstundis fyrsti dysturin eftir vetrarsteðgin, so liðini hava ikki verið í dysti í 3 vikur.

Undan dystinum liggur ÍF á odda í meistaradeildini hjá kvinnum, men beint í hølunum á teimum liggur TB, sum bert er eitt stig aftanfyri oddaliðið. Tað vil siga, at vinnarin av dystinum leygardagin leggur seg við vissu á odda í bestu kvinnudeildini.

Hetta eru helst eisini tey bæði liðini, sum hava havt bestu gongdina síðstu dystirnar. Gestirnir úr Fuglafirði hava vunnið síðstu tríggjar dystirnar, og teirra spæl hevur riggað ótrúliga væl í seinastuni.

Hjá TB hevur eisini gingið væl. Tríggir av síðstu fýra dystunum eru endaðir við sigri, og tí er ikki heilt av leið, at júst hesi bæði liðini liggja á odda í meistaradeildini hjá kvinnum.

ÍF hevur takið á TB

Liðini hava møtt hvørjum øðrum tvær ferðir undan týdningarmikla toppdystinum leygardagin. Hesir báðir dystirnar hava verið í grundspælinum, og í fyrra dystinum, sum var á Kambsdali, eydnaðist ÍF at vinna ein rættiliga tryggan sigur.

Hevði ÍF vunnið trygt á Kambsdali, so var slett eingin ivi, tá liðini møttu hvørjum øðrum í Trongisvági í síðsta dystinum av grundspælinum. Her vann ÍF ein sannførandi 3-0 sigur, so ÍF hevur veruliga havt takið á TB í ár.

Undan dystinum í Trongisvági er ÍF helst lítil favorittar, men TB hevur tó til góðar at vinna á ÍF í ár, so tær fara sikkurt at leggja nógv fyri í teirra rondum at basa oddaliðnum.

Fleyr-ÍF:

ÍF kann endurvinna oddasessin

ÍF hevur møguleika at leggja seg aftur á odda í meistaradeildini hjá monnum, tá teir vitja hjá Fleyr leygardagin

FLOGBÓLTUR
Teitur Joensen
teitur@sosialurin.fo

Bert ein dystur verður á skránni í meistaradeildini hjá monnum í vikuskiftinum, tá Fleyr tekur ímóti ÍF. Mikukvøldið misti ÍF oddasessin, tá Mjølnir vann á SÍ í Sørvági, men nú hava fuglfirðingarnir møguleika at vinna oddasessin aftur, um teir vinna dystin á Fleyr leygardagin.

Gongdin hjá gestunum úr Fuglafirði hevur verið stak góð í ár. Frá fyrsta dysti løgdu teir seg á odda í bestu mansdeildini, og líka til nú hava teir megnað at varðveitt henda oddasessin. Júst nú er Mjølnir frammanfyri, men ÍF hevur tó leikt ein dyst færri.

Hjá Fleyr hevur ikki gingið eins væl og hjá gestunum. Teir hava ligið í boninum í alt árið, og júst nú liggja teir á fjórða plássið, men líkindini fyri heiðursmerkjum eru ikki serliga stór, tí lopið upp til trý tey ovastu liðini er rættiliga stórt.

ÍF hevur ikki havt trupulleikar av Fleyr

Hesi bæði liðini hava eisini møtt hvørjum øðrum tvær ferðir fyrr í grundspælinum, og í báðum førum hevur ÍF vunnið rætiliga trygt. Í fyrra dystinum vann Fleyr annars fyrsta settið, en eftir hetta var eingin ivi um úrslitið. ÍF vann nevniliga seinastu trý settini trygt.

Í seinna dystinum var heldur eingin ivi. Tá vann ÍF 3-0, og heldur ikki hesaferð megnaði Fleyr at gera stórvegis mótstøðu.

Nú møtast hesi bæði liðini so aftur, og undan dystinum má ÍF metast at vera stórfavorittur at vinna hann. Vinna teir dystin, so leggja teir seg aftur á odda í bestu mansdeildini í flogbólti.